# Stongt vegna kongaliga vitjan

**Tað er ikki gerandiskostur her á landi, at vit fáa kongaliga vitjan. Tískil verða nógv heldur óvanlig stig tikin í hesum sambandi.**

Hoff Stuff
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Eitt gott dømi um hetta er tað, at fleiri fyritøkur, handlar og virki kring landið leggja stilt, tá ið kongaliga fylgi leggur leiðina framvið. Mánadagin spákaðu tey kongaligu í havnargøtum, og tá hingu fólk í øllum vindeygum, sum vendu út móti vegnum, har tey kongaligu gingu. At lítið er fingið av skafti hesa løtuna, er einki at ivast í.

Onki breyð og ongar køkur til sandoyingar Týsmorgunin løgdu tey kongaligu leiðina framvið á Sandi, og tá var tað, at vit løgdu til merkis eitt skelti, sum var í hurðini á bakaríinum á Sandi. Á skeltinum stóð skrivað, at vegna kongaliga vitjan var bakaríið stongt millum klokkan níggju og ellivu.

Tískil fingu sandoyingar ongar køkur og onki breyð hesar báðar tímarnar frá einasta bakaranum í oynni. Bakaríið á Sandi er nevnliga einasta bakarí í oynni. Sum skilst hava handlar aðrastaðnis í landinum tikið somu stig, tá ið Margreta drotning, Henrik prinsur, Frederik krúnprinsur og Mary krúnprinsessa hava vitjað.




*Eitt hondskrivað skelti í hurðini hjá bakaríinum á Sandi boðaði frá, at handilin var stongdur millum klokkan níggju og ellivu týsmorgunin vegna kongaliga vitjan.*

Mynd: Jens Kr. Vang



*Fjølmiðlafólkini stríðast ófört fyri at fáa tær bestu myndirnar og søgurnar allastaðnis, har tey kongaligu vitja. Í Føroyum siga útlendsku fjølmiðlafólkini seg hava møtt óvanilga stórum blíðskapi.*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Miðlarnir bornir á lógvum

**Tey mongu útlendsku fjølmiðlafólkini siga seg hava møtt óvanliga stórum blíðskapi í Føroyum.**

Hoff Stuff
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Vanligt er, at fjølmiðlafólk, ið fylgja við teimum kongaligu kring heimin, standa uttan fyri og bíða, meðan tey kongaligu eru inni ymsastaðnis og vitja og fáa eitthvørt leskiligt at eta og drekka. Soleiðis hevur tó ikki verið í Føroyum, og tey mongu útlendsku fjølmiðlafólkini siga seg hava møtt óvanliga stórum blíðskapi undir vitjanini í Føroyum seinastu dagarnar.

### Oksasteik og brún sós

At sandoyingar eru blíðir, kundu tey mongu fjølmiðlafólkini ásanna, tá ið borðreitt var við oksasteik, eplum, grønmeti og brúnari sós, meðan kongaliga fylgi vitjaði kommunuhølini á Sandi.

Slíkt er ikki gerandiskostur hjá mongu fjølmiðlafólkunum, og nógv teirra tóktust fullkomiliga tikin á bóli, tá ið tey vóru bjóðaði innar í ungmannafelagi Virki, har borðreitt var fyri fjølmiðlunum.

Eftir vitjanina á Sandi var farið við Brimli til Suðuroyar, og eisini umborð á Brimli vóru fjølmiðlafólkini væl móttikin og borðreitt var við øllum góðum.

Í Vági var blíðskapurin eisini stórur, og tá ið Vágs Býráð bjóðaði kongaligu gestunum frokost á Hotel Bakkanum, var borðreitt við smyrjubreyði í Framtíðini fyri teimum mongu fjølmiðlafólkunum.

Slík viðferð av teimum mongu útlendsku fjølmiðlagestunum kann bert verða Føroyum til frama.

*Løgtingsformaðurin Edmund Joensen gjørdist mánadagin sjeyndi føroyingurin, ið bleiv útnevndur til kommandør av Dannebrog.*

Mynd: Bárður Lydersen



# Edmund sjeyndi kommandørurin

**Tá ið Edmund Joensen, løgtingsformaður, mánadagin gjørdist kommandørur av Dannebrog, bleiv hann tann sjeyndi føroyingurin í røðini av kommandørum.**

HOFF STUFF
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað er rættuliga vanligt, at drotningin í sambandi við vitjanir her á landi útnevnir nakrar føroyingar til riddarar av Dannebrog, men tað er meiri sjáldsamt, at kommandørar verða útnevndir.

### Politikarar og kirkjumenn

Sum áðurnevnt er Edmund Joensen tann sjeyndi føroyingurin í røðini av kommandørum. Hinir seks eru Hans Jacob Joensen, bispur, Eivind Vilhelm, sáli, Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður, J. Fr. Øregaard, sáli, Johan Djurhuus, sáli, og Jesper Dinesen, kommandørur.

Sostatt kann staðfestast, at tað eru fyrst og fremst politikarar og kirkjumenn, ið hava fingið tann heiður at verða útnevndir til kommandørar av Dannebrog.